# Føroya størsti burgari

**6. flokkur í heimkunnleika á Argja skúla hevur í dag gjørt Føroya størsta burgara**

MATGERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hugskotið kom í veruleikanum frá Útvarpinum. Har høvdu teir ein dagin sagt frá um heimins størsta burgara, og hetta hevði ein drongur fangað. Og tað var hann, sum fortaldi hetta víðari í 6. flokki á Argja skúla. Harvið mentist hugskotið, at gera Føroya størsta burgara.

Níggju næmingar úr 6. a og b eru saman um lærugreinina heimkunnleiki, og tað var í hesum flokki, at tey gjørdu av at royna seg við Føroya størsta burgara. Og í gjáramorgun var so klárt at fara undir verkætlanina. Tí verkætlan má kallast, tí slíkt verður ikki gjørt í eini handavending.

Fyrireikingararbeiðið var tá gjørt. Næmingarnir – 12 og 13 ára gamlir – høvdu útvegað uppskrift, og síðani faldað hesa upp til teir eftir metan høvdu tilfar til metroyndina.

- Vit nýttu fimm kilo av farsi, og allur burgarin vigar tjúgu kilo, greiddu næmingarnir frá.

## Tók tríggjar tímar

Súsanna Holm er lærari hjá flokkinum, og hon segði, at tey høvdu malið gularøtur og leyk í farsið soleiðis, at tað skuldi gerast eitt sindur sunnari enn burgarar annars eru.

- Børnini hava gjørt alt sjálvi. Steikt búffin og bakað burgarabreyðið, umframt sjálvandi at lagt tomatir, agurkir, ost og annað ímillum, sigur Súsanna.

Tey byrjaðu klokkan hálvgum 11 í gjáramorgun og vóru ikki liðug, fyrr enn klokkan var um hálvgum tvey seinnapartin. Men tað er skiljandi, tí búffurin lá á pannuni í hálvanannan tíma, meðan tað tók góðar 45 minuttir at baka búffbreyðið.




*Liðið, ið framleiddi burgaran, er frá vinstru: Gert Dragastein, Anna Tórunn á Stongunum, Jeanette við Sandá Lassen, Randi Karlotsdóttir, Rannvá Winther, Mourits Mouritsen, Jens Ingolvur Leivsson Holm, Gerda Ferjá Heldarskarð og Anna Maria Hammer. Aftast Súsanna Holm, lærari.*

Hvussu tey vita, at hetta er Føroya størsti burgari?

Jú, Chippo lýsir við, at tey hava Føroya størsta burgara, men hesin er kortini ikki størri enn so, at hann rúmast á einum borðiski.

- Og hevur onkur hug at bjóða okkum av í so máta, eru tey hjartaliga vælkomin, siga børn og lærari í 6. a og b í heimkunnleika í Argja Skúla.




*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*